# Løgreglan undir lupp

*Spurningurin um eftirlitið við løgregluni verður tikin upp í sambandi við arbeiði, at fyrireika eina føroyska grundlóg og rættarskipan, sigur landsstýrismaðurin í lógarmálum*

Dánjal Højgaard

-Vit fyrireika okkum í løtuni til sjálvir at umsita løgregluna. Tað er púra greitt, at tað má vera eitt óheft eftirlit við løgregluni.

Hetta sigur Høgni Hoydal, landsstýrismaður í lógarmálum, eftir at Sosialurin leygardagin staðfesti, at Føroyar eru einasta løgregluumdømi í danska kongaríkinum, har løgreglan framvegis sleppur at viðgerða kærur móti sær sjálvari.

Í Danmark varð málið tikið úr hondunum á løgregluni fyri nøkrum árum síðani. Har hava tey eina skipan við sonevndum politikærunevndum, ið skulu tryggja eina óhefta viðgerð, tá fólk kæru framferðina hjá politinum.

1. januar var ein líkandi skipan sett í verk í Grønlandi.

Men í Føroyum er tann gamla skipanin við eini lokalnevnd framvegis galdandi. Í hesi nevnd, sita m.a. fútin og tvey umboð fyri løgregluna. Og tann skipanin er als ikki trygg fyri borgararnar, vísa advokatar á.



*Landsstýrismaðurin í lógarmálum roknar við, at spurningurin um eina óhefta politikæruskipan verður viðgjørdur í sambandi við grundlógararbeiðið*

**Mynd: Jens Kristian Vang**

### Viðgjørt í nevndum

Landsstýrismaðurin í lógarmálum sigur, at løgreglan er danskt málsøki, sum landsstýrið ikki hevur ábyrgdina av.

-Landsstýrið er í hesum føri slett ikki eftirlitsmyndugleiki. Tað er danski løgmálaráðharrin, sum hevur ábyrgdina av virkseminum hjá løgregluni í Føroyum, sigur hann.

Landsstýrismaðurin sigur, at fyribils hevur hann ongar ætlanir, um sjálvur at reisa málið um politikæruskipanina. Hetta tí, at spurningurin uttan iva verður viðgjørdur av nevndunum, sum í løtuni fyrireika føroyska grundlóg og rættarskipan.

-Vit hava sett eina rættarskipanarnevnd, sum eisini viðger leiklutin hjá løgregluni, m.a. hetta við at løgreglan virkar sum ákærumyndugleiki.

-Eg ivist onga løtu í, at tað koma uppskot um at fáa nógv greiðari reglur á økinum, har ansa verður eftir, at myndugleikar ikki sleppa at viðgerða seg sjálvar, sigur Høgni Hoydal.

-Eg fari at bíða eftir úrslitinum av tí arbeiði, sum verður gjørt undir grundlógarnevndini, har allir hesir spurningarnir verða viðgjørdir frá grundini av, sigur hann.

### Einki kjak

Um orsøkina til, at Føroyar eru einasta politiumdømi í danska kongaríkinum, har skipanin við óheftum politikærunevndum ikki er sett í verk, sigur Høgni Hoydal:

-Tað er galdandi fyri eina rúgvu av donskum lógum, at tær koma ikki í gildi í Føroyum. Prosessin í Føroyum er øgiliga trek. Tað gongur ómetaliga strilið, at at dagføra ríkislógir í Føroyum, sigur hann.

Í Danmark hevur rættiligt orðaskifti verið um eftirlitið við politinum. Men av tí, at løgreglan er danskt málsøki hevur einki kjak verið í Føroyum um leiklutin hjá løgregluni, vísir Høgni Hoydal á.

-Tað er neyvan nakrantíð komið fyri, at vit í Føroyum hava viðgjørt spurningin um leiklutin hjá politinum. Spurningurin um hvør ið hevur eftirlit við politinum o.s.fr. man neyvan nakrantíð hava verið viðgjørdur hvørki á løgtingi ella í landsstýrinum, sigur hann.



## KÆRUR UM LØGREGLUNA

Soleiðis verða kærur móti løgregluni viðgjørdar í Danmark, Grønland og Føroyum

| DANMARK | GRØNLAND | FØROYAR |
| --- | --- | --- |
| **1. Statsadvokaturin** Ein statsadvokatur viðgerð kæruna/meldingina. Hann savnar upplýsingar í málinum og tekur støðu til hvørt atburðurin hjá politinum skal átalast ella um ákæra skal reisast. | **1. Politimeistarin** Politimeistarin ella ein av hansara løgfrøðingum viðgera kærumálið. Politimeistarin savnar upplýsingar í málinum og tekur støðu til hvørt atburðurin hjá politinum skal átalast ella um ákæra skal reisast. | **1. Lokalnevnd** Ein lokalnevnd, sum er mannað við fútanum, tveimum løgreglufólkum, fýra løgtingsmonnum og einum advokati, móttekur kærur um politiið og kannar eftir um málið er nóg væl lýst. |
| **2. Politikærunevnd** Ein óheft politikærunevnd, sum er mannað av einum advokati og tveimum øðrum borgarum, tekur støðu til úrskurðin hjá statsadvokatinum. Er nevndin ósamd við statsadvokatin kann hon kæra málið til ríkisadvokatin, ið er ovasti myndugleiki í kærumálum móti politinum. | **2. Politikærunevnd** Ein óheft politikærunevnd, sum er mannað av einum advokati og tveimum øðrum borgarum, tekur støðu til úrskurðin hjá politimeistaranum. Er nevndin ósamd við statsadvokatin kann hon kæra málið til ríkisadvokatin í Keypmannahavn, sum hevur seinasta orðið. | |

Grafikkur Sosialurin

# Granskingarteldan tendrað

*Granskingardepilin í Klaksvík er farin til verka í gomlu politistøðini í býnum, sum er umvæld innan og innrættað av nýggjum.*

Dánjal Højgaard

Samstundis sum tað gjørdist endaliga greitt, at økisgranskingin í Klaksvík verður veruleiki, eru handverkararnir um at vera lidnir við arbeiðið, at umskapa politistøðina til granskingardepil.

Øll miðhæddin er umvæld og innrættað av nýggjum. Gólv og loft eru skift út, og nýggir skilaveggir eru settir upp, so at hølini hóska til síni nýggju endamál. Ljóst og snotiligt er inni.

Tað eru Fuglø Arkitektar í Klaksvík sum hava teknað nýggju hølini, sum fevna um tríggjar skrivstovur og eina móttøku. Samstundis sum handverkarar leggja seinastu hond á sítt arbeiði, hava granskararnir sett sjøtul á sítt. Tá Sosialurin stakk inn á gólvið á deplinum í síðstu viku var tann fyrsta teldan sett upp og tendrað, og bíðað varð eftir telesambandi - og innbúgvi.

Granskingardepilin í Klaksvík skal granska møguleikarnar at menna øki í føroyska samfelagnum, sum liggja kring miðjaðaran. Fleiri verkætlanir eru á skránni og virksemi verður eisini aðrasteðs enn í gomlu politistøðini.





*Dan Nielsen, virkandi býráðsformaður á Tvøroyri:*

# Sjálvandi atkvøða suðuroyartingmenn fyri oljuhavn í Suðri

Jan Müller

Frá í dag tekur Dan Nielsen, næstformaður í Tvøroyrar Býráð við sum virkandi býráðsformaður, nú Páll Vang er sjúkrameldaður. Óvist er, nær Páll Vang verður førur fyri at taka við aftur. Tað er eingin loyna, at fáur politikari í Suðuroynni hevur stríðst so nógv fyri at fáa oljuútgerðarhavnina til Suðuroynna sum júst Páll Vang. Og aftanfyri hann hava staðið mest sum allir politikarar í oynni.

Mikudagin fer tingið undir 2. viðgerð av uppskotinum til útbjóðing til oljuboring. Í hesum sambandi hevur Javnaðarflokkurin lagt fram broytingaruppskot. Flokkurin mælir til, at tað í standarsloyvinum kemur at standa, at komandi oljuvirksemi í Føroyum skal ganga út frá Suðuroynni.

Virkandi býráðsformaðurin á Tvøroyri umboðar Tjóðveldisflokkin, og hann ber ongan ótta fyri, at løgtingsumboðið hjá flokkinum í oynni, Hergeir Nielsen, ikki skal fara og atkvøða fyri uppskotinum hjá Javnaðarflokkinum.

-Eg havi tosað við Hergeir Nielsen og sum eg havi skilt á honum, so hann fer at atkvøða fyri Javnaðaruppskotinum.

*-Men hvussu tekur tú tað, um Hergeir Nielsen ikki fer at atkvøða fyri uppskotinum?*

-Hann er í eini slíkari støðu, at hann er noyddur til at atkvøða fyri uppskotinum. Sjálvandi fara allir tingmenn í oynni at atkvøða fyri, at ein komandi oljuútgerðarhavn kemur at liggja her í oynni.

Dan Nielsen sigur annars, at spurningurin um oljuútgerðarhavnina hevur ómetaliga nógv at siga fyri oynna. -Støðan her í oynni er desperat. Tað nyttar ikki at fara at leika í um eini 10 ár, tí tá er fólktalið minkað so nógv, at oyggin rætt og slætt er hildin uppat at virka. Virkandi býráðsformaðurin á Tvøroyri telist eisini millum teirra, sum eru sannførdir um, at byrjar virksemi t.d. á Sundi ella í Runavík, so verður tað verandi har.

Hvat viðvíkur spurninginum um oljuútgerðahavnin skal liggja á Drelnesi ella í Vági, so heldur Dan Nielsen, at hetta er nakað teir mugu taka upp í oynni eftir at málið er samtykt í tinginum. Hann ivast ikki í, at tað fer at bera til at finna onkra skilagóða loysn, sum alt oyggjafólkið er nøgt við.

Sosialurin hevur roynt at fáa viðmerkingar til hetta málið millum tingmenn o.o. og skilur blaðið, at verður uppskotið hjá Javnaðarflokkinum felt, tí onkur kanska ikki kann svølgja, at oljuvirksemið verður plaserað so lokalt sum í Suðuroynni, so kann eitt broytingaruppskot koma fram, har orðið útjaðarin verður sett ístaðin fyri Suðuroynna.



*Bæði lokal- og landspolitikarar úr Suðuroynni hava gjørt nógv burtur úr við at reklamera fyri eini oljuútgerðarhavn í oynni. Henda myndin varð tikin á Hotel Hafnia fyri nakað av tíð síðani, tá Drelnesprojektið varð almennakunngjørt. Á myndini er eisini landsstýrismaðurin í oljumálum sum heldur að vera skeivt at lóggeva um, hvar ein oljuúgerðarhavn skal vera*

*Poul Mohr, vinnulívsmaður:*

# Havi álit á løgtinginum





*Poul Mohr: Íløgurnar eru gjørdar og Sund liggur bara og bíðar*

Jan Müller

Hóast fleiri stórmál eru til viðgerðar í tinginum hesa vikuna, so munnu mong oyru og eygu verða vend móti tí eina málinum, nevniliga spurninginum um, antin tað skal lóggevast um, hvar í landinum ein oljuútgerðarhavn skal liggja. Ein av teimum, sum hevur og fer at fylgja við orðaskiftinum og ikki minst atkvøðugreiðsluni á tingi mikudagin er Poul Mohr, stjóri, ið eisini stendur aftanfyri ætlanina at leggja eina oljuútgerðarstøð á Sundi.

Poul Mohr sigur seg hava tað álit á løgtinginum, at tað ikki fer at lóggeva eina ávísa vinnu til bara at kunna virka í einum ávísum øki í landinum. Sjálvur heldur hann, at talan er bara um eitt uppskot, sum hevur til endamál at skaffa einum flokki atkvøður. Hann ivast ikki í, at uppskotið frá Javnaðarflokkinum fellur, tí tað er eftir hansara metan burturvið at gera eina lóg, har tú samtíðis diskriminerar øll onnur øki í landinum. -So kann onkur annar koma við uppskotum sum t.d. siga, at alt, sum hevur við trol at gera skal ganga úr Klaksvík, alt línuvirksemi skal ganga úr Runavík og hvat man nú kann finna uppá.

Poul Mohr vísir annars á, at Smyril slapp ikki at á Drelnesi í ódnarvirkinum í vikuskiftinum, og skipini máttu eisini rýma úr Runavík. -Eg var sjálvur uppi á Sundi og hugdi tá, og har var fínt verður sigur ein heldur speirekandi Poul Mohr, sum tó viðgongur, at tað var ringasta ætt í Runavík.

Poul Mohr ynskir ikki at úttala seg meira um hetta málið og vísir á, at Sund liggur og bíðar. Har liggur longu ein stór íløga. Eingir almennir ella kommunalir pengar skulu brúkast har.

Í Runavík eru teir farnir undir at víðka um havnina við 100 metrum av atløgusíðu og einum øki uppá 10.000 fermetrar. Eisini er ætlanin at gera ein høll har. Við sjónvarpið í farnu viku segði býráðsformaðurin Jákup Lamhauge, at teir gera klárt fyri eini møguligari oljuútgerðarhavn, men verður hon av ongum, so verður útbyggingin brúkt til onnur endamál. Útbyggingin har er metta t kosta einar 12-15 mill. kr. og verður liðug at taka í br´jk um sama mundið, sum oljufeløgini fara at bora við Føroyar.




*Runavíkin vil vera eisini vera við í oljumenningini*

Tosa nógv
nógv bíligari



Fyrr 0,35 kr/min.
Nú 0,24
kr./min. um kvøldi fyri fastnet
FØROYA TELE
petur & petur • 320870